Vikublaðið Sosialurin



# Rættleiðing til Vár í Gong

JÁKUP MIKKELSEN
løgtingsmaður



Vár í Gong skrivar í Sosialinum 2. okt., at "tað fall mær fyri bróstið, at hoyra formannin í Trivnaðarnevnd Løgtingsins argumentera fyri, hví hann heldur vildi hava raðfest betong enn bleyt virðið"

Tað sum Vár í Gong skrivar er als ikki í trá við tað eg segði í ÙF – tvørturímóti vísti eg á at Fólkaflokkurin tekur fult undir við at útbyggja heilsuverkið og at byggja fleiri røktarheim, men at tað var skeivt at seta hesar íløgur upp ímóti eitt nú einum tunnli Norð um Fjall. Eg vóni at tað Vár í Gong skrivaði var eitt óheppi val av orðum og ikki ein tilætla manipulatión.

Hyggja vit eftir hvussu nógv Føroya Løgting hevur játtað til eitt nú bygging av røktarheimum, so sæst at bert ein lítil partur av játtanini er brúkt hesi seinastu nógvu árini.

Frá 2006 til 2009 eru bert 38% brúkt av tí sum løgtingið hevur játtað.

Hóast løgtingið hevur játtað nógvan pening til røktarheim, so kunnu vit staðfesta at stórur tørvur er á røktarheimsplássum

Tá farið verður undir at bygga fleiri røktarheim, so er tað óseriøst ikki at taka raksturin við.

Vit vita at landskassin í byggikostnaði, rindar ímillum 500.000 kr og 700.000 kr. til eitt røktarheimspláss.

Vit vita eisini at raksturin liggur ímillum 500.000 og 600.000 kr pr. røktarheimspláss. Tað er neyðugt at finna hesar pengar og tað má sjálvandi vera inni í verandi rakstri. Raksturin 2010 vísir eitt hall uppá 400 til 500 mió.

Ein og hvør má skilja at vit kunnu ikki áhaldandi læna 500 milliónir um árið til rakstur av samfelganum og tí er neyðugt at vit gera neyðugar sparingar í almenna sektorinum, sum er vorðin alt ov stórur, sæð í mun til hvat inntøkur landskassans eru og hvat okkara vinnulív orkar at bera.

Eitt er vist og tað er at 60 mió. í lønarhækking til tey alment løntu, høvdu komi væl við hjá teimum sum hava størstan tørv í okkara samfelag.

# Kappingarárið 2009

JOHN SIGURD JOENSEN



So fór besta liðið hjá KÍ niður í 1. deild at leika komandi ár. Og so sjálvt árið, sum KÍ fyllir 105 ár – at fara í fyrstu deild ger tað ikki betur.

Eg sigi, sum formaðurin hjá KÍ segði í samrøðu. Einki annað at gera enn at bróta upp armar og koma upp aftur longu komandi ár.

Nú er nokk bert besta liðið hjá HB, sum ongan tíð er farið niður, síðani niðurflyting varð sett í guldið. Ynski HB hjartaliga tillukku við tí 20. Meistaraheitinum í bestu deildini og Víkingi fyri at hava hava vunnið steypakappingina.

Kaga vit aftur, tá landskappingin, sum byrjaði í 1942, og fram til 1972, tað vil siga í 30 ár, vinnur besta liðið hjá KÍ meistaraheitið heilar 15 ferðir. Tað vil siga, at besta liðið hjá KÍ vinnur meistaraheitið annað hvørt ár hesi 30 árini. Eitt satt bragd má sigast. Og hartil er at undrast yvir, at bert tvey meistaraheiti í bestu deildini eru vunnin síðani 1973 og til 2009. Tað vil siga í heili 36 ár. Hvat sum hevur verið galið, veit eg ikki, tí KÍ hevur sanniliga átt nógvar góðar leikarar hesi árini. Annars fari eg bert at ynskja KÍ alt tað besta í framtíni, og at komandi árini fara at gangast væl hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag. Til endans fari eg ynskja besta kvinnuliðnum hjá KÍ í fóbólti hjartaliga tillukku við tí 10. Meistaraheitinum á rað. Sanniliga eitt bragd av teimum heilt stóru.

# Taka frá teimum fátæku, geva til tey ríku!

ZAKARIAS WANG



Vit hava eina løgna politiska skipan.

Í løgtinginum sita rík fólk, sum samtykkja skattalógir. Hesar verða gjørdar soleiðis, at tað eru tey fátæku, sum gjalda tyngstu skattirnar, meðan tey ríku sleppa lagaligari.

Summi sleppa heilt undan at gjalda nakað sum helst.

Higartil hevur tað tó verið ein skattur, sum tey ríku ikki eru sloppin undan, og tað hevur verið sjúkrakassagjaldið, tí tað er lagt á øll uttan mun til inntøku.

Nú ið bløðini skriva um, at várt land fer um koll, sum Kári P. yrkti, verður skattalætti givin, tí nú verður sjúkrakassagjaldið avtikið.

Tey, sum nú sleppa undan, eru tey ríku, sum nú yvirhøvur ongan skatt koma at gjalda. Tey fátæku, tey sum frammanundan gjalda skattirnar, fáa nú lagt á sínar herðar at figgja tann miss, sum tað almenna fær av at sleppa teimum ríku undan tí einasta skattinum, sum tey higartil hava goldið.

# Leggið frá tykkum – ella set flokkarnar frælsar

HØGNI HOYDAL



**Landsstýrið er í løtuni bert ein alment fíggjaður pallur til valstríð millum flokkar og floksformenn. Tá ið landið liggur í stjórnarloysi eiga løgmaður og landsstýrið at leggja frá sær. Gera tey ikki tað, eiga flokkarnir sum minsta mark at setast frælsir, so semjur kunnu gerast á tingi um neyðug átøk**

Støðan í føroyskum politikki í dag er onki annað enn eitt alment fíggjað valstríð hjá samgonguflokkunum og teirra leiðarum. Løgmaður, landsstýrisfólk, nevndarformenn hjá samgonguni og einstaklingar í samgonguni sleppa at nýta sínar sessir at koma sær framat í fjølmiðlunum til politiskt spinnarí og markeringar mótvegis hvørjum øðrum – og standa ikki til svars fyri nakran politikk.

Tá valstríð er (og soleiðis átti tað sjálvandi eisini at verið í dagligum politiskum orðaskifti), verður vanliga skipað so fyri, at allir flokkar og sjónarmið sleppa framat í miðlunum. Men í hesum samgonguvalstríði setir landsins stjórn einsamøll dagsskránna og er nógv meira andstøða enn stjórn:

Landsstýrisflokkarnir senda nærum dagliga tíðindaskriv móti hvørjum øðrum. Eru í beinleiðis kjaki mótvegis hvørjum øðrum. Senda ófiggjaðar, óviðgjørdar og tómar valballónir upp móti hvørjum øðrum, sum síðani verða skotnar niður av øðrum landsstýrisfólkum ella enntá floksfeløgum Geva øðrum ábyrgdina fyri egnar skeivar avgerðir. Skelda í fjølmiðlunum inn á avgerðir, teir sjálvir hava tikið. Og seta samfelagsbólkar upp móti hvørjum øðrum.

**Dagligt spinnarí uttan nakað endamál**

Í løtuni er javnaðarflokkurin á odda í spinnarínum. Javnaðarflokkurin, sum alla CHE-samgonguna bardist fyri tunlum, sum forkomu tí samgonguni og so seint sum fyri 4 mánaðum síðani, atkvøddi fyri bæði verklagslógunum um tunnil Norður um Fjall og Sandoyartunnil – velur nú at siga tað, sum andstøðan hevur ført fram síðani valið: At nú má raðfestast øðrvísi. Men hvat er broytt hesa tíðina? Onki uttan veljarakanningarnar. Og hvat er broytt í íløgunum? Ja, aftur eru settar íløgur á, sum verða tær samtyktar, útloysa 600 milliónir næsta ár, sum ikki peningur er funnin til. Hetta politiska spinnið fjalir so eisini allar teir niðurskurðir hjá veikastu bólkunum, sum teir samtyktu – langt áðrenn teir fóru eftir fakfeløgunum, sum nú fáa skyldina fyri hesar niðurskurðir.

Síðani vil løgmaður eisini sleppa at markera seg og spæla harður mótvegis fakfeløgunum. Nú hava tey skyldina fyri niðurskurðirnar hjá Kaj Leo. Men hann meinti tað so ikki allíkavæl – og næstformaðurin í sambandsflokkinum og vinnumálaráðharrin sleppur so eisini framat at markera seg móti útsagnum løgmans.

Fólkaflokkurin fer so nú at gera síni politisku "stunt" fyri at yvirhála løgmann mótvegis fakfeløgunum. Bjarni Djurholm sleppur so eisini framat at ganga ímóti Anfinni Kallsberg við tunlum. Meðan Annika Olsen sigur, at tað er sera skilagott fyri búskapin og arbeiðsskapandi at gera eina heilt aðra tunnilsætlan, hóast hon sigur, at hinar tunnilsætlanir ikki eru arbeiðsskapandi og góðar fyri búskapin.

Hetta spinnaríið hevur ikki til endamáls at fremja nakran politikk, men skal bara royna at seta einstøku flokkarnar í bjartari ljós mótvegis hvørjum øðrum.

**Støðan kann ikki halda fram**

Tað stendur øllum greitt, at landsins stjórn er ikki samd um nakran politikk á nøkrum øki – og ongin leiðsla er yvirhøvur. Samstundis standa vit við størstu fíggjarliga og búskaparliga avbjóðingum í nýggjari tíð. Samgongan – var hon at sær komin – átti tí sjálvsagt at lagt frá sær, so vit fingu eitt reelt valstríð, har álvarin í støðuni og flokkana boð sluppu framat og kundu verið endavend..

Vit í Tjóðveldinum hava lagt fram okkara greiðu ætlanir til at vinna á búskaparligu støðuni og at gera neyðugu broytingarnar og átøkini.

**Stórur meiriluti er fyri broytingum**

Ongin ivi er um, at breið semja kann finnast millum okkum og stóran part av Løgtinginum um flestu stórmálini. Men hesar semjur bera ikki til, tí hóast samgongan ikki er samd og ikki er til, so er hon til allíkavæl, tá tað snýr seg um at minnilutar í samgonguni blokera fyri málum, ið kunnu venda gongdini.

Hyggja vit at politisku samansetingini í tinginum, so er ongin ivi um, at helst tveir triðingar av tinginum kunnu finna saman um hesi mál:

At seta fullveldisgongdina í verk aftur beinanvegin.

At gera langtíðarætlanir fyri íløgur og at avrigga serskipanir eftir føstum ámámáli.

Ein fiskivinnureform, ið kann tryggja, at ábendingarnar um góðan gróður, yngulkanningar og møguleikan at stovnarnir koma fyri seg aftur kunnu gagnnýtast búskaparliga og ikki elva til nýggja ovfisking.

Ein nýggjan kommunubygnað, ið kann bøta mundandi um ábyrgdir, tænastur og búskaparstýring.

At satsa miðvíst uppá hægri útbúgving, gransking og mentan.

At tryggja veikastu bólkarnar mótvegis niðurskurðum.

Eina nýggja pensjónsskipan, ið kann lyfta lægstu pensjónistarnar og fíggja framtíðar pensjónir hjá øllum.

At broyta stirvnar vinnubygnaðir og eggja til íverksetan.

At leggja um til varðandi orku og seta okkum høg umhvørvis- og orkumál.

At styrkja alt okkara altjóða infrakervi og vinna okkum atgongd til altjóða samstarv.

**Setið flokkarnar frælsar**

Eg kundi nevnt fleiri mál, har breið semja er í tinginum og í fólkinum um átøk og broytingar. Og tað eru sjálvandi ikki altíð somu meirilutar í øllum málum.

Men hesir meirilutar fáast ikki at virka, tí lítlir minnilutar og siðvenjurnar í samgongum forða fyri, at fólk kunnu taka undir við góðum uppskotum frá andstøðu ella øðrum.

Tí er mín áheitan til samgonguna og løgmann. Leggið frá tykkum og útskrivið nýval.

Um tit ikki gera tað, setið so í minsta lagi flokkarnar á tingi frælsar til at finna saman um tey stóru og átrøðkandi málini – hóast samgongan ikki kann semjast.

Hetta hundalívið kann ikki halda fram, uttan at tað fær enn djúptøknari avleiðingar fyri okkara búskap og framtíð – og ikki minst fyri alt álitið á okkum sjálvi og eitt føroyskt fólkaræði.